# Risastór íløga

Fyritøkan Norðurál hevur gjørt av at byggja eitt stórt aluminiumsvirki í Helguvík, sum er stutt norðan fyri Keflavík. Í gjár almannakunngjørdi felagið tølini í sambandi við verkætlanina, og tey eru stór. Mett verður, at virkið fer at kosta millum fimm og seks mia. danskar krónur, og av hesum fara ætlandi umleið 15 prosent til lønir í byggitíðini. Nýggja virkið skal takast í nýtslu um árslok 2010 og fer at framleiða 150.000 tons av aluminium árliga.



*Nýggja virkið skal byggjast her í Helguvík (Mynd: Vísir)*

# Eingin stuðulssáttmáli

Í vikuni ljóðaði, at íslendski tjóðbankin kanska fór at venda sær til hinar norðurlendsku tjóðbankarnar um hjálp til at styrkja íslendsku krónuna, og at hetta skuldi gerast eftir einum sáttmála millum tjóðbankarnar. Men í gjár kunngjørdi svenski tjóðbankin, at eingin tílíkur sátmáli er til. Tað sama sigur tann finski tjóðbankin, og sambært Bloomberg skilst hevur orðaskiftið í íslendsku fjølmiðlunum eisini vakt ans í danska tjóðbankanum.

# Tápuligt stríð um brandskeið

**Føroyskir yvirmenn eru noyddir at taka stórt sæð sama brandskeið tvær ferðir fyri at fáa góðkent trygdarprógv - Spill av tíð, lærarakreftum og landsins resursum, heldur føroyskur yvirmaður. – Góðskutrygd, sigur leiðarin á Trygdarmiðstøðini**

SJÓVINNA
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*



*Føroyskir yvirmenn eru noyddir at taka ikki færri enn tvey brandskeið, sum yvirlappa hvørt annað, áðrenn teir sleppa til skips*

Fyri tveimum mánaðum síðani tók ein føroyskur yvirmaður brandskeið við Áir. Fyri at fáa endaligt trygdarsertifikat, skal yvirmaðurin, nú taka trygdarskeið á Trygdarmiðstøðini í Klaksvík. Hetta skeiðið tekur tveir dagar, har annar dagurin er settur av til brandskeið.

Við próvnum um, at hann júst hevur tikið brandskeið við Áir, í hondini, gekk yvirmaðurin út frá, at hann slapp undan at brúka ein heilan dag í Klaksvík at venja seg at sløkkja eld.

Men so var ikki. Frá Trygdarmiðstøðini færmaðurin nevniliga at vita, at Trygdarmiðstøðin ikki kann góðskriva skeiðið, hann hevur tikið við Áir.

- Eg dugi ikki við mín besta vilja at skilja, hví Trygdarmiðstøðin ikki kann góðskriva eitt tveir mánað gamalt brandskeið, sum hartil er munandi meir umfatandi enn tað, tey bjóða í Klaksvík. Eg eri nevniliga noyddur at taka skeiðið við Áir, tí skeiðið í Klaksvík lýkur ikki krøvini, ið verða sett, um eg skal út at sigla sum yvirmaður, sigur maðurin, og sipar til, at brandskeiðið í Klaksvík ikki umfatar roykkaving.

### Góðskutrygd

Frá Trygdarmiðstøðini í Klaksvík verður sagt, at ongi formlig krøv eru um, at støðin skal góðskriva brandskeið, tikin við til dømis Áir. Eisini vísir leiðarin, Marius Magnussen á, at gjørdu teir tað kortini, kann tað fáa óhepnar avleiðingar.

- Vit kunnu ímynda okkum eina støðu, har bert ein vika er eftir av vanligu fimm ára gildistíðini á skeiðnum, ið er tikið aðrastaðni. Góðskriva vit eitt slíkt prógv, merkir tað, at tað ganga 10 ár uttan endurnýgging av skeiðnum, ið má sigast at vera ábyrgdarleyst, sigur Marius Magnussen.

Hann minnir tó á, at hóast ónøgdin við støðuna má sigast at vera menniskjalig, tryggjar galdandi mannagongd, at góðskan á trygdarpróvnum er í lagi.

### Spill av tíð og kreftum

Javnan frættist, at føroyskir sjómenn ikki sleppa avstað til skips, tí bíðitíðin at sleppa á kravda trygdarskeiðið í Klaksvík er so long.

Eitt nú skal áðurnevndi yvirmaður bíða í tríggja vikur, til hann sleppur á trygdarskeið. Sjálvur ímyndar hann sær, at um ikki allir hesir yvirmennirnir vóru noyddir at taka dupult brandskeið, hevði tað stytt um bíðitíðina

Marius Magnussen váttar, at tað av og á er bíðitíð at sleppa á skeiðið. Hann heldur tó ikki, at hetta kann setast beinleiðis í samband við, at yvirmenn verða noyddir at taka brandskeið tvær ferðir.

- Bíðitíðin stavar sum oftast frá, at fólk, ið hava teknað seg til skeiðið, kortini ikki møta upp, og tað gongur út yvir planleggingina, sigur leiðarin á Trygdarmiðstøðini.

Yvirmaðurin er tó framvegis sannførdur um, at tvørligi mátin at ogna sær eitt trygdarsertifikat í Føroyum stavar frá, at stovnarnir eftir øllum at døma ikki megna at samskipa síni skeiðstilboð.

- Meðan yvirmenn aðrastaðni taka eitt samlað trygdarskeið, mugu vit taka tvey ymisk, sum hartil yvirlappað hvørt annað. Eftir mínum tykki er hetta spill av tíð, lærarakreftum og landsins resursum, sigur yvirmaðurin.

# Stórsligin filmur um Grønland í Miðlahúsinum

**Mánakvøldið verður norðuratlantisk frumsýning av vakra grønlendska filminum "Við frosnu fossarnar" í Miðlahúsinum**

FILMUR
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*
*Mynd: Isak Kleist*



Grønlendski journalisturin Isak Kleist, hevur framleitt áhugaverda filmin "Við frosnu fossarnar", sum snýr seg um lívið við Diskovíkina. Í sambandi við stóru veðurlagsráðstevnuna í komandi viku hevur hann gjørt av at koma til Føroyar at hava norðuratlantiska frumsýning av filminum.

Filmurin gevur eina mynd av lívinum við Diskovíkina, um sambandið millum náttúruna og fiskivinnuna, og hvussu viðbrekið havið er í einari náttúru, har ógjørligt er at dyrka lendið.

Ítøkiliga hevur innlandsísurin, jøklarnir og íslagið stóran týdning fyri vistskipanina og fotosyntesuna í Diskovíkini og restina av arktiska heiminum. Filmurin gevur eisini eina mynd av møguligum avleiðingunum fyri grønlendska samfelagið, vinnulívið, búskapin og fólkalívið, um vistskipanin broytist munandi vegna alheims upphitingina.

Tittulin á grønlendskum er: "Kuussuit Qerisut Sinaanni" , og á enskum "By the Frossen Rivers".

Filmurin er í tveimum pørtum á 35 minuttir í part. Til sýningina í Miðlahúsinum verður donsk tala og undirtekstir á filminum.

**Frumsýningin verður í Miðlahúsinum mánakvøldið kl. 20. Umframt Isak Kleist kemur annaðhvørt Josef Motzfeldt, grønlendskur landstingslimur og fyrrverandi ráðharri, ella Juliane Henningsen, folketingslimur, at siga nøkur orð um filmin í Miðlahúsinum.**